NORDIKLÍV

# Tryggingaryvirlit

***Fyri Bólkalívsavtalu nr. 98583 um Restskuldartrygging***

Tryggingaryvirlitið er ein samandráttur av tíni bólkalívsavtalu og viðkomandi tryggingartreytum, sum eru galdandi fyri tína tryggingaravtalu við NordikLív.

Treytirnar, sum verða nevndar niðanfyri, lýsa tær yvirskipaðu reglurnar í bólkalívsavtaluni og tryggingartreytunum, undir hesum fulnaðir og lokaaldur, sum eru galdandi fyri bólkalívsavtaluna. Forenede Gruppeliv (FG) viðgerð innkomnu umsóknirnar um trygging, eins og FG eisini viðgerð fráboðaðu skaðarnar.

Um tað er ósamsvar millum tryggingaryvirlitið og bólkalívsavtaluna, er tað bólkalívsavtalan, ið er galdandi.

## Hvat er ein restskuldartrygging?

Við Restskuldartrygging hevur tú møguleika at tryggja teg og tini fíggjarliga, um tú verður álvarsliga sjúk/ur ella skuldi follið frá.

Tryggingin er galdandi alt samdøgrið og um allan heim, tó ikki við skaðar, ið eru avleiðing av virknari luttøku í kríggi, uppreistri ella líknandi virksemi.

## Hvørjar fulnaðir og tryggingarupphæddir hevur tú teknað?

Í yvirlitinum niðanfyri sært tú treytirnar fyri teir fulnaðir, sum eru galdandi fyri restskuldartryggingina.

Tú kanst síggja tínar tryggingarfulnaðir og tryggingarupphæddir í Netbankanum hjá BankNordik.

| Tryggingarfulnaður – Yvirlit | |
|---|---|
| Fulnaður fyri deyða | Fulnaður fyri deyða fer úr gildi við endan á tí ársfjórðingi, tú fyllir 67 ár.<br><br>Endurgjald verður veitt, um tú doyrt í tryggingartíðini.<br><br>Tryggingarupphæddin verður goldin inn á tína skuld í BankNordik.<br><br>Er tryggingarupphæddin hægri enn skuldin, verður avlopið goldið beinleiðis til næsta avvarandi, uttan so at annað er fráboðað NordikLív av bólkaliminum ella stendur í bólkalívsavtaluni.<br><br>"Næstu avvarðandi" eru samsvarandi § 7 í tryggingartreytunum: Hjúnafelagi bólkalimsins, ein sambúgvi, ið lýkur krøvini í §7 stk. 3, børn, arvingar sambært testamenti ella arvingar sambært lógini.<br><br>Rættindini til fulnað við deyða falla burtur, um eingin heimilaður er sambært serligum ásetingum um framíhjárættindi, ásetingum um framíhjárættindi í bólkalívsavtaluni, testamenti ella arvingar sambært lógini. |
| Óarbeiðsførisveiting | Fulnaðurin við óarbeiðsføri fer úr gildi við endan á tí ársfjórðingi, tú fyllir 67 ár.<br><br>Upphæddin verður útgoldin, um tín arbeiðsførleiki í tryggingartíðini vegna sjúku ella vanlukku verður skerdur við í minsta lagi tveimum triðingum.<br><br>Upphæddin verður útgoldin til tín. Upphæddin er eitt mánaðarligt gjald og verður útgoldin frá tí degi, tín arbeiðsførleiki hevur verið støðugt niðursettur í 3 mánaðir. Mánaðarliga upphæddin verður útgoldin, fram til tín arbeiðsførleiki ikki longur er skerdur við tveimum triðingum tó í seinasta lagi tann mánaðin, tá ið tú doyrt ella fyllir 67 ár. |
| Fulnaður fyri bráðsjúku | Fulnaðurin fyri bráðsjúku fer úr gildi við endan á tí ársfjórðingi, tú fyllir 67 ár.<br><br>Tryggingarupphæddin fyri bráðsjúku verður útgoldin til tín.<br><br>Tær bráðsjúkur og sjúkuavgerðir, ið eru fevndar av tryggingini, verða nærri lýstar í skjalinum *Fulnaður í sambandi við ávísar bráðsjúkur fyri vaksin*, ið er tøkt á www.nordikliv.fo. |

| | |
|---|---|
| | Rætturin til fulnaðin fyri bráðsjúku fellur burtur, um tú doyrt, uttan so at tú frammanundan skrivliga hevur latið inn umsókn um útgjald fyri bráðsjúku. |
| Fulnaður um tykkara børn fáa bráðsjúku | Fulnaður í sambandi við ávísar bráðsjúkur hjá børnum fer úr gildi við endan á tí ársfjórðingi, tú fyllir 67 ár, ella tá ið barnið fyllir 18 ár.<br><br>Tryggingarupphæddin fyri bráðsjúku hjá børnum verður útgoldin til tín.<br><br>Tað er ein treyt fyri fulnaði fyri børn hjá tær og/ella tínum hjúnafelaga/sambúgva, at hjúnafelagin/sambúgvin og barnið liva saman við bólkaliminum á felags bústaði, tá sjúkuavgerðin fyri barnsins bráðsjúku verður tikin/barnið doyr, og hava gjørt tað í minsta lagi 6 mánaðir, áðrenn sjúkuavgerðin varð tikin/barnið doyði.<br><br>Tú kanst lesa meira um, hvørjar sjúkur og sjúkuavgerðir eru fevndar av tryggingini í skjalinum *Fulnaður í sambandi við ávísar bráðsjúkur hjá børnum*, ið er tókt á www.nordikliv.fo. |

*Nærri treytir fyri samlív í sambandi við hjúnafelagafulnað/upphædd/rentu sæst í § 4 í tøku tryggingartreytunum á www.nordiklív.fo.

## Tilskilan við útgjald av tryggingarupphædd

Um tú kundi hugsað tær, at upphæddin við deyða skal ognast øðrum enn næsta avvarðandi, kanst tú gera hetta við at fylla út broytingarskjalið, ið er tøkt á www.nordikliv.fo og lata skjalið til NordikLív ella BankNordik.

## Arvaavgjald

Við útgjald fyri deyða skal rindast møguligt arvaavgjald av upphæddini. Vavi av upphæddini er ymiskt, alt eftir hvør arvar og hvussu nógv.

## Skattur og avgjøld

Restskuldartryggingin er fevnd av galdandi lóggávu um eftirløn, og tí kunnu vera avgjøld ella skattur, ið skal rindast við inn- ella útgjald. Tú kanst lesa nærri um skatting í sambandi við lívstryggingar á heimasíðuni hjá TAKS, www.taks.fo.

## Umsókn um útgjald frá bólkalívsavtaluni

Um tú skalt fráboða bráðsjúku ella óarbeiðsføri, skalt tú fylla út umsóknarskjalið, ið liggur tøkt á www.nordikliv.fo og lata hetta til BankNordik ella FG umvegis teirra heimasíðu: https://www.fg.dk/fakta/kontakt-fgkontaktformular/

Fráboðan um deyða skal latast NordikLív, sum síðani kunnar FG.

## Uppsøgn av tryggingini

Tryggingarfulnaðurin fer úr gildið við endan á tí mánaði, ið tú fer burturúr tryggingaravtaluni í sambandi við uppsøgn, tó í seinasta lagi við endan á tí mánaði, tá ið tú doyrt ella fyllir 67 ár.

## Tryggingargjald

Tryggingargjaldið fyri restskuldarstryggingina verður ásett einaferð um árið.

## Tryggingarveitari

Tryggingin verður veitt í samstarvi við Forenede Gruppeliv A/S (FG). FG er skrásettur tryggingarveitari í yvirlitinum hjá Fíggjareftirlitinum fyri tryggingarveitarar.

Tú kanst lesa meira um FG sum tryggingarveitara á heimasíðu teirra, www.fg.dk.

## Dátuábyrgd

Fyri at kunna gera eina meting um, hvørt tú kanst og undir hvørjum treytum tú kanst tekna eina trygging ella fáa útgjald, má tryggingargevarin hava og viðgera persónupplýsingar um teg. NordikLív Lívstryggingarfelag P/F er dátuábyrgdari av viðgerðini av tínum persónupplýsingum.

Tínar heilsuupplýsingar verða viðgjørdar í trúnaði og verða goymdar á tryggan hátt.

So leingi tú hevur tryggingina, varðveitir NordikLív tínar heilsuupplýsingar. Tá ið tín trygging fer úr gildi, verða tínar heilsuupplýsingar strikaðar sambært galdandi reglunum í dátuverndarlógini / databeskyttelsesloven.

Vilt tú vita meira um viðgerðina av tínum persónupplýsingum, kanst tú lesa meira um hetta á heimasíðuni hjá NordikLív við at trýsta her.

## Lógargrundarlag

Vanligu ásetingarnar í føroyskum rættarreglum um tryggingaravtalur og føroysk lóggáva annars verður nýtt í tann mun, at ásetingarnar í tryggingaravtaluni ikki víkja frá lógini.

Rættindi sambært bólkalívsavtaluni kunnu ikki avhendast, veðsetast ella á annan hátt keypast, seljast ella leggjast fyri rættarsókn.

## Kærumøguleiki

Vilt tú kæra um niðurstøðu í tínum máli, mæla vit tær til, at tú í fyrstu atløgu vendir tær til tað starvsfólkið ella deild, ið hevur viðgjørt títt mál. Um tú eftir hetta framvegis ert ósamd/ur í niðurstøðuni, kanst tú senda inn kæru til kæruviðgeran hjá FG umvegis klaguskjal á www.fg.dk undir "Fakta" – "Klagemuligheder" ella við at senda bræv til FG, Direktionen, Krumtappen 4, Postboks 442, 2500 Valby.

Um tú, eftir at kæran er viðgjørd, framvegis ikki ert nøgd/ur við avgerðina, kanst tú kæra til Ankenævnet for Forsikring.

NordikLív er limur í Ankenævnet for Forsikring, sum viðger kærur frá brúkarum viðvíkjandi tryggingarmálum.

Kærur til Ankenævnet skulu sendast umvegis heimasíðuna: www.Ankeforsikring.dk.

## Gildisvirknaður

Hetta tryggingaryvirlit er galdandi frá 1. januar 2023, og til nýtt yvirlit verður útflýggjað.